Álit

í

løgtingsmáli nr. 67/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin) (Leingja heimildina at fáa meirvirðisgjald endurrindað í sambandi við bygging ella umbygging av ávísum leigubústøðum, keyp av ávikavist orkuvinarligum motorakførum og elriknum hitapumpuskipanum og dagføring av reglunum um leigubilar)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 8. desember 2020 og eftir 1. viðgerð 10. desember 2020, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 12., 14., 26. og 28. januar 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri bilasølurnar Reyni Service, Auto Service, Bilasøluna, Waag bilar, Wenzel, Nordbil, Nordcar, Berg Motors og Bilrøkt, Gunnar Justinussen, Áhugafelagið fyri HVS, Sp/f Rhesa, Mariu Poulsen, Demich, Ólav Poulsen, Ringrás, Føroya Náttúruverndarfelag, SEV, landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen, saman við Umhvørvisstovuni og við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, saman við Akstovuni og TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Magnus Rasmussen, Jákup Mikkelsen, Bill Justinussen og Kristin Michelsen) vísir á, at lógaruppskotið hevur tvey høvuðsendamál.

Tað fyrra høvuðsendamálið er at leingja og lutvíst útbyggja heimildirnar at endurrinda meirvirðisgjald í sambandi við bygging/umbygging av ávísum leigubústøðum, og keyp av ávikavist orkuvinarligum motorakførum (el-, vetnis- og plug-in hybrid akførum) og elriknum hitapumpuskipanum.

Meirilutin metir tað verða neyðugt at leingja heimildirnar at endurrinda meirvirðisgjald í sambandi við bygging/umbygging av ávísum leigubústøðum. Áramálið er sett til 5 ár.

Til partin um at leingja heimildirnar fyri endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við keyp av orkuvinarligum motorakførum (el- og vetnis-akførum), vil meirilutin vísa á, at umframt at leingja heimildina er talan um at víðka hana til eisini at fevna um plug-in hybrid akfør, sum higartil ikki hava fingið endurrindað meirvirðisgjald á sama hátt sum el- og vetnisbilar.

Meirilutin tekur undir við hesi broyting. Meirilutin tekur eisini undir við, at endurrindanin minkar stigvíst sum frálíður fyri síðani at detta heilt burtur í 2025. Hetta er grundað á eina væntan um, at prísurin á hesum motorakførum helst fer at lækka sum frálíður.

Til partin um at leingja heimildirnar fyri endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við keyp av elriknum hitapumpuskipanum, har man mælir til at lækka endurrindanina sum frálíður, metir

meirilutin, at stigvísa minkingin ikki eigur at byrja í 2023, men í 2024, soleiðis at tað eisini í 2023 fæst full endurrindan av meirvirðisgjaldinum, og hevur meirilutin tí broytingaruppskot hesum viðvíkjandi.

Tað seinna høvuðsendamálið er at dagføra reglurnar um leigubilar í § 10 í meirvirðisgjaldslógini. Meirilutin metir tað vera rætt at dagføra reglurnar um leigubilar, men heldur, at í staðin fyri at lækka markið úr 12.500 km niður í 10.000 km, eigur man at lækka tað til 8.500 km.

Verandi áseting, sum hevur ein mesta frádrátt á kr. 45.000, ber í sær, at tað ikki loysir seg fíggjarliga fyri ein bilútleigara at keypa ein dýran leigubil til billeigaran, sum ynskir sær ein bil, sum í dygd og hentleikum liggur omanfyri miðal. Samstundis ber ásetingin í sær, at tað ikki eru leigubilar tøkir til kræsnu billeigararnar. Men í staðin fyri heilt at strika verandi hámark á kr. 45.000, mælir meirilutin til at hækka tað til kr. 60.000.

Meirilutin hevur tí eisini broytingaruppskot viðvíkjandi partinum um leigubilar.

Meirilutin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 3 verður § 3 d, stk. 1 orðað soleiðis:
   "Tey, sum gera íløgur í góðkendar hitapumpuskipanir til upphiting og heitt vatn í sethúsum og bygningum, kunnu eftir umsókn fáa endurgoldið part av meirvirðisgjaldinum av íløgukostnaðinum til hitapumpu, útbúnað og arbeiðsløn. Í 2021, 2022 og 2023 verður alt meirvirðisgjaldið endurgoldið. Í 2024 og 2025 verður helvtin av meirvirðisgjaldinum endurgoldið. Í 2026 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjaldið ikki endurgoldið."

2. Í § 1, nr. 4 verður "31. desember 2024" broytt til: "31. desember 2025".

3. Í § 1, nr. 5 verður "31. mars 2025" broytt til: "31. mars 2026".

4. Í § 1, nr. 6 verður "10.000 km" broytt til: "8.500 km".

5. § 1, nr. 7 verður orðað soleiðis: "**7.** § 10, stk. 2, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
   "Við sølu av leiguakfari kann frádrátturin í mesta lagi vera 60.000 kr. í útgangandi avgjaldinum fyri hvørt leiguakfar.""

6. § 2 verður orðað soleiðis:

   "**§ 2**

   Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2021."

Viðmerkingar:

Til nr. 1:

Við broytingini verða heimildirnar fyri endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við keyp av elriknum hitapumpuskipanum longdar við einum ári afturat til at vera í gildi til og við 2025 heldur

enn 2024, og stigvísa minkingin, har endurgjaldið minkar niður í eina helvt, verður sett inn eitt ár seinni, í 2024 heldur enn 2023.

Við hesari broyting fæst sostatt full endurrindan av meirvirðisgjaldi í sambandi við keyp av elriknum hitapumpuskipanum í 2021, 2022 og 2023, meðan helvtin av meirvirðisgjaldinum verður endurgoldið fyri árini 2024 og 2025. Einki mvg-endurgjald verður goldið í 2026 og fylgjandi ár.

Til nr. 2:

Sum avleiðing av broyting nr. 1 verður freistin fyri, nær samlaðu útreiðslurnar skulu verða hildnar, longd við einum ári afturat, frá 31. desember 2024 til 31. desember 2025.

Til nr. 3:

Sum avleiðing av broyting nr. 1 verður freistin fyri, nær góðkend umsókn um endurrindan av meirvirðisgjaldi skal vera TAKS í hendi, longd við einum ári afturat, frá 31. mars 2025 til 31. mars 2026.

Til nr. 4

Við hesari broyting verður minstamarkið fyri talið av kilometrum, sum leigubilar skulu hava koyrt fyri at kunna verða avgjaldsviðgjørdir eftir brúktbilsregluni, lækkað úr 12.500 km niður í 8.500 km heldur enn 10.000 km.

Til nr. 5

Heldur enn at strika verandi áseting, sum hevur ein mesta frádrátt á kr. 45.000, so einki hámark er, verður mesti frádrátturin við hesari broyting hækkaður til kr. 60.000.

Til nr. 6

Ásetingin um gildiskomu verður broytt frá 1. januar 2021 til at vera dagin eftir kunngerð, men tó verður ásett, at lógarbroytingin fær virknað frá og við 1. januar 2021.

Við hesum viðmerkingum og broytingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Aksel V. Johannesen, Páll á Reynatúgvu og Ruth Vang) mælir til nakrar broytingar.

Minnilutin heldur tað vera alt annað enn nøktandi, at landsstýrismaðurin leggur hetta uppskotið fram á Løgtingi tann 8. desember 2020, sum skal hava virknað frá 1. januar 2021. Eitt uppskot, sum als ikki hevur verið til hoyringar og hevur eina rúgvu av grundleggjandi broytingum við sær, sum kunnu hava stóra ávirkan á grøna umskiftið, stóra ávirkan á inntøkur landskassans og eisini ávirka kappingina í bilasøluvinnuni.

Minnilutin tekur undir við, at verandi skipan um afturbering av meirvirðisgjaldi til tann, sum byggir/umbyggir bygning til leigubústaðir fyri meira enn kr. 200.000, verður longd í fimm ár.

Minnilutin tekur eisini undir við, at verandi skipan við meirvirðisgjaldsafturbering av el- og vetnisbilum og grønum orkuskipanum til bygningar verður longd. Minnilutin heldur tó, at skipanin í § 3 d eisini átti at fevnt um sólorku/sólfatur, men tað fáa vit ikki broytt við broytingaruppskoti til hetta uppskotið.

Eftir uppskotinum verður afturberingin 100 prosent í 2021 og 2022, 50 prosent í 2023 og 2024, og fellur afturberingin burtur 1. januar 2025. Hetta skotbráið er alt ov stutt, og tí verður skotið upp, at

afturberingin verður 100 prosent í 2021, 2022, 2023 og 2024 og síðani 50 prosent árini 2025, 2026, 2027 og 2028, og fellur afturberingin soleiðis burtur 1. januar 2029.

Minnilutin tekur í verandi støðu ikki undir við, at mvg-afturberingin eisini skal fevna um plug-in hybrid bilar. Plug-in hybrid bilar kunnu vera munandi meira umhvørvisvinarligir enn bensin- og dieselbilar, men fortreytin er, at bilarnir regluliga verða løddir. Kanningar frá øðrum londum vísa, at tað verða bilarnir ikki, og tá er lítil munur á hesum bilum og vanligum bensin- og dieselbilum. Nevndin hevur fingið upplýst, at plug-in hybrid bilar, hóast teir verða brúktir rætt, ikki eru eins grønir sum el-bilar. Um avgjaldspolitikkurin eggjar føroyingum at keypa plug-in hybrid bilar, so fer hetta uttan iva at seinka grøna orkuumskiftinum. Minnilutin mælir landsstýrismanninum til, at tílíkar broytingar verða gjørdar í tøttum samstarvi við orkumyndugleikan hjá landinum, Umhvørvisstovuna.

Viðvíkjandi leigubilum hevur Fíggjarnevndin fingið upplýst, at meginparturin av leigubilunum verður útleigaður til útlendsk ferðafólk. Røddir eru frammi um, at mvg-undantøkan hevur spekulatión við sær, har høvuðsendamálið ikki er at leiga bilar út, men at kunna selja hesar bilarnar mvg-frítt. Minnilutin tekur ikki støðu til hesar gitingar, men tað er ikki óhugsandi, at so er. Uppskotið hjá landsstýrismanninum tekur burtur ovara markið fyri mvg-undantøku av leigubilum, soleiðis at luksusleigubilar eisini verða fevndir av mvg-undantøkuni. Hesum taka vit ikki undir við. Um múgvandi útlendskir gestir ikki vilja rinda tað, ein leigubilur kostar, so er eftirspurningurin ikki har. Undir øllum umstøðum heldur minnilutin ikki, at tað gevur meining, at vit føroyingar skulu stuðla útlendskum ferðafólki í at kunna leiga bilar bíliga í Føroyum.

Fíggjarnevndin hevur fingið upplýst, at nærum eingir leigubilar eru umhvørvisvinarligir. Minnilutin mælir tí til, at øll skipanin við mvg-undantøku av leigubilum (*stuðul til útlendsk ferðafólk*) verður tikin burtur. Eykainntøkan, sum landskassin hevði fingið við hesari broyting, eigur í staðin at verða brúkt til at lækka avgjøldini á bilar sum heild, sum føroyingar keypa, og eisini til løðistøðir kring landið. Sjálvsagt eigur tað at verða gjørt við grønu umleggingini í huga, og tí eigur ein tílík broyting at verða gjørd í tøttum samstarvi við Orku á Umhvørvisstovuni.

Við hesum viðmerkingum setir minnilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 2 verður 2. pkt í § 3 c, stk. 1 strikað.

2. Í § 1, nr. 2 verður stk. 2 orðað soleiðis:
”*Stk. 2.* Í 2021, 2022, 2023 og 2024 verða í mesta lagi kr. 70.000 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2025, 2026, 2027 og 2028 verða í mesta lagi kr. 35.000 endurgoldnar eftir hesi grein. Í 2029 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjald ikki endurgoldið.”.

3. Í § 1, nr. 2 verður stk. 3 orðað soleiðis:
”*Stk. 3.* Fyri at fáa endurgoldið meirvirðisgjald eftir hesi grein, skal motorakfarið verða skrásett í seinasta lagi 31. desember 2028.”

4. Í § 1, nr. 3 verður 2.-4. pkt. í § 3 d, stk. 1 orðað soleiðis:
”Í 2021, 2022, 2023 og 2024 verður alt meirvirðisgjaldið endurgoldið. Í 2025, 2026, 2027 og 2028 verður helvtin av meirvirðisgjaldinum endurgoldið. Í 2029 og fylgjandi ár verður meirvirðisgjaldið ikki endurgoldið.”

5. Í § 1, nr. 4 verður ”31. desember 2024” broytt til: ”31. desember 2028”.

6. Í § 1, nr. 5 verður ”31. mars 2025” broytt til: ”31. mars 2029”.

7. Í § 1 verða nr. 6 og 7 strikað.

8. § 2 verður orðað soleiðis:

”**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar 2021.”

Viðmerkingar:

Til nr. 1:

Við hesi broyting strikar man tí uppskotnu víðkanina av mvg-afturberingini, sum nú eisini skuldi fevna um plug-in hybrid akfør.

Til nr. 2:

Við hesi broyting verða bæði tíðarskeiðini longd við hvør sínum tveimum árum afturat, so fult endurgjald fæst árini 2021-2024 og hálvt endurgjald í 2025-2028.

Til nr. 3:

Talan er um fylgibroyting til broyting nr. 2 omanfyri.

Til nr. 4:

Við hesi broyting verða bæði tíðarskeiðini longd við hvør sínum tveimum árum afturat, so fult endurgjald fæst árini 2021-2024 og hálvt endurgjald í 2025-2028.

Til nr. 5 og 6:

Talan er um fylgibroytingar til nr. 4 omanfyri.

Til nr. 7:

Broyting nr. 6 og nr. 7 í uppskotinum, sum snúgva seg um leigubilar, verða strikaðar.

Til nr. 8:

Ásetingin um gildiskomu verður broytt frá 1. januar 2021 til at vera dagin eftir kunngerð, men tó verður ásett, at lógarbroytingin fær virknað frá og við 1. januar 2021.

Við hesum viðmerkingum og broytingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 9. februar 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	